

MYND: POLFOTO

*– Faktiskt kenni eg einki til Føroyar, men eg eri spentur at uppliva okkurt nýtt, og eg havi hoyrt frá onkrum, sum hevur vitjað í Føroyum, at har er sera pent, sigur Sidney Lee*

# Sidney Lee ætlar sær ikki at skora í Føroyum

– EG HAVI MØTT FLEIRI **FØROYSKUM** KVINNUM Í DANMARK, MEN EG ERI **MEIRA** TIL MYRKAR OG **EKSOTISKAR** KVINNUR, SIGUR **SIDNEY LEE**, SUM VITJAR Í FØROYUM UM **VIKUSKIFTIÐ**



**SIDNEY LEE**

**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Hann er kendur fyri at verða kendur. Hann er umbiðin víðahvar til undirhaldstiltøk og fjølmiðlasendingar, men nógv rysta við høvdinum eftir hansara lívsførslu og meiningum.

Nú kemur eingin annar enn Sidney Lee til Føroya at vitja um vikuskiftið.

Sjálvbrúna danska reality-stjørnan skal verða gestabarrvørður í Havn og Klaksvík um vikuskiftið, og hann gleðir seg til Føroya ferðina.

– Faktiskt kenni eg einki til Føroyar, men eg eri spentur at uppliva okkurt nýtt, og eg havi hoyrt frá onkrum, sum hevur vitjað í Føroyum, at har er sera pent, sigur Sidney Lee.

– Eg helt, at tað ljóðaði spennandi at fara til Føroya ein túr, og so er hetta eisini ein partur av mínum arbeiði sum gestabarrvørður, sigur hann.

## Skal ikki skora

Sidney Lee stórtrívist í leiklutinum sum miðlapersónurin, sum í grundini bert er kendur fyri at vera kendur. Hann kom fram í reality-røðini Singleliv, men hevur verið frammi í skiftani samanhangum síðani tá.

– Eg elski hetta lívið við veitslum, gallakvøldum og premierum. Eg sleppi at uppliva eina rúgvu, sigur Sidney Lee.

– Tað, sum er eitt sindur keðiligt, er tá eg verði kendur aftur á gøtuni. Eg havi einki ímóti at práta við fólk, tá eg eri til arbeiðis, men eg vil helst hava frið, tá eg havi frí.

Sidney Lee er kendur fyri at hava skiftandi konufólk, men líkt er ikki til, at hann fer at fiska í Føroyum.

– Eg ætli mær ikki at skora í Føroyum, tí eg havi damu. Eg havi møtt onkrum føroyskum kvinnum í Danmark, men mær dámar betur myrkar, eksotiskar kvinnur enn ljósar damur sum tær føroysku, sigur Sidney Lee.

Hann verður at hitta í Rex í Havn fríggjakvøldið og í Club 700 í Klaksvík leygarkvøldið.

## INNIHALD


4 SAMRØÐA: **WILHELM PETERSEN**
6 HEILSUSÍÐAN: **SET MATIN RÆTT SAMAN**
7 TIPS: **BLONDIR, FLESAR OG PUFFAR Í VÁRMÓTANUM**
8 90 SEKUND: **HEINI Í SKORINI**
10 REPORTASJA: **SOLEIÐIS SKRIVAR MAN EINA KRIMI**
12 BAKGRUND: **HVAT HENDI VIÐ 90-ARA SUPERMODELLUNUM**
14 TIL ARBEIÐIS: **HERDIS GAARDBO**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 BAKGRUND: **P-BOLLIN 50 ÁR**
18 SPYRST SO LIVST: **RIGMOR SVARAR**
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **SKINKURULLUKØKA**
23 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OSFR**
24 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**


VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Inna Törnroos
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Wilhelm Petersen / Mynd: Álvur Haraldsen

**KLUMMAN**



*Uni Arge*

# Politiska stættin

Vit kunnu kjakast leingi um valdømir, landspolitikk mótvegis lokalpolitikki og kynskvotur mótvegis mansumboðan á tingi.

Men samd munnu tey flestu vera um, at tað besta fyri landið er, at demokratisku spælireglurnar eru støðugar og lagdar til rættis við umhugsni.

Í løgtinginum tykist ongin virðing at vera fyri, at so skal vera. Har taka einstaklingar stig til at broyta valskipanina í dag, og í morgin eru Føroyar eitt valdømi.

Eitt hálvt valskeið seinni herjar ein forsmáddur minniluti á aftur og leggur uppskot fyri tingið um at býta landið aftur í sjey valdømir, og eisini tað verður samtykt.

Í somu øði verða uppskot løgd fram um at skipa landið í fimm valdømir, at hava fólkaatkvøðu um spurningin og at seta serfrøðingar at viðgera málið.

Upploysnin í tinginum um valdømini man vera eindømi í vesturlendskum fólkaræði, og lítil ivi er um, at hon skaðar umdømið hjá landi og fólki.

Uppaftur verri man tað vera, at hon tekur trúnna frá kvinnum, monnum og ungfólki á, at tingið yvirhøvur virðir landsins veljarar og arbeiðir seriøst.

Men øðrvísi fær tað illa verið, tá ongin miðvísur politikkur er á dagsskrá, og politikarar tí ganga mest upp í karmarnar, teir áttu at ført veruligan politikk í.

Fylgir tú við í politikki nóg leingi, fert tú at hóma eitt mynstur í atferðini hjá fleiri, sum fara upp í politikk. Hetta mynstrið er ikki so vandamikið, um tað hómast hjá nøkrum fáum.

Men vísir mynstrið seg hjá mongum, er vandi fyri, at politikkur fer at verða førdur mest fyri politisku stættina í landinum heldur enn landið og fólkið. Mynstrið er hetta:

Fyrst ert tú idealistur fyri eini sak, so verður tú samvitskufullur politikari, síðan lærir tú at gera rossahandlar og verður ein lúrin taktikari, og at enda heldur tú, at tú ert tann politiska skipanin og ognartekur demokratisku spælireglurnar fyri egnan vinning.



MYND: JENS KRISTIAN VANG